## Connie kommiserur

Fyrsta dagin fer Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharri, at boða frá, hvør skal umboða Danmark í ES-nevndini eftir Mariann Fischer Boel, sum hevur verið kommiserur í landbúnaðarmálum, men sum nú fer frá. Kappingin stendur millum ráðharrarnar Bertel Haarder og Connie Hedegaard, men sambært BT hevur forsætisráðharrin longu gjørt av, at tað verður Connie Hedegaard. Tað hevur hann gjørt eftir trýsti frá ES-nevndarformanninum Jose Manuel Barroso, sum vil hava fleiri kvinnur í ES-leiðsluna. Harafturat skal Konservativi Fólkaflokkurin hava kravt kommiserstarvið, skrivar BT.



## Útróðrarmenn á ST-ráðstevnu

Tveir útróðrarmenn úr Ilulissat í Grønlandi hava fingið innbjóðing til at halda røðu fyri leiðandi politikarum og granskarum í sambandi við altjóða veðurlagsráðstevnuna í Keypmannahavn. Grønlendska kringvarpið veit at siga, at Johannes Mathæussen og Ville Siegstad skulu greiða frá, hvørjar ávirkan tann veksandi hitin á jørðini hevur á teirra gerandisdag og livikor. Johannes Mathæussen sigur við KNR, at fyri 15 árum síðani var ísurin í Ilulissat-fjørðinum einar fimm metrar tjúkkur, men at í dag er hann bara millum ein hálvan og ein metur.



*Fíggjarlógin skal úr fíggjarnevndini skjótt, og í tí sambandi er millum annað spurt, um tað ber til at leggja øll sjúkrahúsini undir somu játtan. Men meginparturin av fíggjarnevndini visti ikki av, at spurningurin var settur og fíggjarnevndarlimurin, sum tekur sær av heilsumálum, fann brádliga útav, at tað ikki var hon, sum hevði sett spurningin*

# Sjúkrahús undir somu játtan?

**Aksel V. Johannesen, heilsumálaráðharri, sigur, at sum politiska støðan er í løtuni, so kann ikki roknast við, at sjúkrahúsini verða sett undir somu leiðslu og játtan. Fíggjarnevndin hevur annars spurt um tað ber til. Men meginparturin av fíggjarnevndini visti ikki av, at tey høvdu sett spurningin**

FÍGGJARLÓG

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Fíggjarnevndin hevur spurt heilsumálaráðharran, um tað ber til at leggja øll trý sjúkrahúsini undir somu leiðslu og somu játtan.

Aksel V. Johannesen, heilsumálaráðharri, heldur ikki, at tað er politisk undirtøka fyri tí, men skuldi tað verið tað, so er tað ein veruleiki, hann má fyrihalda seg til, og reint teoretiskt ber tað til.

– Somu spurningar vórðu setti í samband við fíggjarnevndarviðgerðina í fjør, og tá varð funnið fram til, at politisk undirtøka ikki var fyri at leggja sjúkrahúsini undir somu leiðslu, men at sjúkrahúsini heldur skuldu virka sum ein eind. Tað arbeiða vit við, og leiðslurnar hava regluligar fundir, sigur Aksel V. Johannesen, sum ikki heldur tað vera løgið, at fíggjarnevndin spyr tað sama í ár, sum í fjør.

– Tað er opinbart onkur, sum heldur at tað skal vera soleiðis, men mær vitandi er ikki semja í fíggjarnevndini at leggja alt undir somu leiðslu. Men tey eru sjálvandi vælkomin at spyrja.

### Magni eigur spurningin

Í fíggjarnevndini eru økini býtt ímillum nevndarlimirnar, og Annita á Fríðriksmørk tekur sær av heilsumálum. Men tá Sosialurin spurdi hana í morgun, mintist hon ikki reiðiliga, hvussu spurningarnir ljóðaðu. Men vísti hon á, at hon ikki tekur undir við at leggja alt undir somu leiðslu.

– Eg spurdi um hatta. Eg vildi bara vita, hvat fíggjarmálaráðharrin hevði í hyggju, segði Annita á Fríðriksmørk.

Sosialurin hevur somuleiðis verið í samband við aðrar fíggjarnevndarlimir, og onkur av teimum visti als ikki at spurningurin var settur.

– Eg veit onki um hatta. Andstøðan veit onki um hasar spurningarnar, sigur Torbjørn Jacobsen.

Men tað eru ikki bara andstøðulimir, sum ikki kendur til spurningarnar.

Eyðgunn Samuelsen sigur, at hon frætti um spurningarnar og svarini hjá landsstýrismanninum í miðlunum, og Anfinn Kallsberg sigur, at spurningurin als ikki hevur verið umrøddur við borðið í fíggjarnevndini.

Bill Justinussen sigur seg hinvegin vita, at onkur hevði tosað um at spyrja, men hann var ikki greiðir yvir, at nakar hevði spurt, fyrr enn Sosialurin ringdi í morgun.

Magni Laksáfoss bleiv hinvegin eitt sindur illa við, tá hann fekk at vita, at Annita á Fríðriksmørk hevði sett spurningarnar.

– Hevur hon tað? Um hon vil eiga hasar spurningarnar, so lati eg hana tað, sigur Magni Laksáfoss, sum undrast, at fleiri fíggjarnevndarlimir ikki vita av, at spurningarnir eru settir.

Men gjøgnum morgunin, fann Annita á Fríðriksmørk útav, at hon als ikki átti spurningin.

– Tað undraði meg, at eg visti so lítið um spurningarnar. Men tað er ikki so løgið, tí tað var Magni, sum átti spurningarnar, segði Annita á Fríðriksmørk, eftir at fíggjarnevndin hevði verið á fundi í eina løtu.

### Ójavnar meiningar

Men hóast fíggjarnevndin hevur spurt, um tað ber til at leggja alt undir somu leiðslu og somu játtan, og landsstýrismaðurin hevur sagt, at tað ber til í teoriini, so eru fíggjarnevndarlimirnir sera ójavnir á máli, um tað skal gerast ella ikki.

Summi meta, at alt skal undir somu játtan, so meira fæst fyri peningin, meðan onnur meta tað vera beinleiðis býtt, tí tað fer at gera sjúkrahúsini kring landið veikari.

– Vit arbeiða eitt sindur, hvør í sínum lagi, sigur Eyðgunn Samuelsen, um arbeiðið hjá fíggjarnevndini í løtuni.

## Skifta stjóra í Atlantic Petroleum

**Atlantic Petroleum boðaði fríggjadagin frá, at Wilhelm Petersen, stjóri, er farin frá við virknaði beinanvegin**

- Eg vil takka Wilhelmi Petersen fyri hansara stóru hjálp til menningina av Atlantic Petroleum. Undir hansara leiðslu er felagið vorðið ein altjóða leikari í olju- og gassvinnuni við tveimum oljuøkjum longu í framleiðslu, og uppaftur tveimum oljuøkjum, sum væntandi koma í framleiðslu yvir tey næstu tvey til trý árini, segði Birgir Durhuus, nevndarformaður í Atlantic Petroleum.

Einki varð sagt um, hvørt hann er uppsagdur, ella sjálvur hevur valt at fara frá. Tað varð sagt, at hann fer frá í »fullari semju millum báðar partarnar«.

Nevndarformaðurin segði við Rás2 fríggjadagin, at Vilhelm Petersen ikki hevur rættar kvalitetir til oljufelagið í framtíðini.

Wilhelm Petersen fer frá við virknaði beinanvegin, men fer í eitt tíðarskeið upp á eitt ár at vera tøkur sum ráðgevi hjá felagnum.

Fyribilssettur stjóri er Sigurð í Jákupsstovu.

Nevndin fer beinanvegin í gongd við at leita eftir nýggjum stjóra.

Nevndarformaðurin staðfesti eisini, at Sigurð í Jákupsstovu verður millum evnini til nýggjan stjóra.

**- eij**